# Góða Ovastevnu



Aftur í ár stevna fólk úr øllum landinum til Nólsoyar á Ovastevnu. Stevnan, sum hevur til endamáls at útvega pening at gera svimjihyl til børnini í bygdini. Eitt lyfti, sum navnframi Ove Joensen gav, tá hann fyri góðum tjúgu árum síðani einsamallur róði tann langa tein úr Nólsoy til Keypmannahavnar.

At nólsoyingar spenna seg út til at taka væl ímóti stevnugestum, sæst á stevnuskránni, sum gerst alt meira fjølbroytt fyri hvørt ár. Her eru alskyns tilboð til bæði ung og gomul. Á skránni eru kabarett, loppumarknaður, felagssangur, dansur, konsertir, hoppiborg og mangt, mangt annað.

Umframt hesa fjølbroyttu skránna, eru svimjingin um Nólsoyarfjørð og árliga Regattasiglingin, sum endar á Ovastevnu, eisini serligir og forvitnisligir partar av stevnuni.

Nólsoyingar sita ikki hendur í favn – her hendir altíð okkurt. Og eitt, sum er hent síðani stevnuna ífjør er, at kunningarstova er latin upp í bygdini.

Tórshavnar Kommuna fegnast almikið um hetta megnartak, sum nólsoyingar hava tikið. Tá kommunan ífjør tók stig til at menna Nólsoynna sum ferðavinnuoyggj, vóru nólsoyingar skjótir at taka undir. Í vár lat so kunningarstovan upp, og er nú ein týðandi partur, tá takast skal ímóti gestum.

Og í Nólsoy kenna allir gestir seg vælkomnar, tí blíðskapurin er tiltikin. So uttan mun til, um stevnugestirnir koma við Rituni, við Regattasiglingi, ella svimja um fjørðin, er móttøkan eins hjartalig.

Nólsoyingar hava nú fyrireikað ársins Ovastevnu og skipað fyri, at karmarnir at hátíðarhalda stevnuna eru betri, enn nakrantíð áður.

Latum okkum øll – saman við nólsoyingum – vísa, at í felag kunnu vit skapa hugna og stuttleika. Í felag kunnu vit syrgja fyri, at ovastevnan í ár verður hin besta nakrantíð!

Hjartaliga vælkomin á Ovastevnu!

Heðin Mortensen
borgarstjóri

## Ivasamt stevnuveður



Sambært Petur Skeel verður veðrið ivasamt um vikuskiftið. Hann brúkar vendingina »vánaligt«, men hyggja vit nærri at veðurvánunum á baksíðuni síggja vit, at vánaliga veðrið eftir øllum at døma ikki kemur fyrr út á seinnapartin sunnudagin. Vindurin, altso.

Annars verður spátt mjørki og regn av og á alt vikuskiftið. Ættin verður eystan og landnyrðingur og vindurin 3-8 ms. Og tað er jú tað, vit vanliga rópa brúkiligt føroyskt summarveður.

Og sum longu nevnt, so kemur vindurin eftir øllum sólarmerkjum ikki fyrr enn seinnapartin sunnudag, men tað verður undir øllum umstøðum hampiligt hjá bátafólkinum at sigla til hús aftur, tí ættin verður undan hjá øllum, ið ikki skulu norður um Mjóvanes. Ættin verður alt vikuskiftið eystan og landnyrðingur, men hann skiftir nakað.

Mánadagin minkar hann so aftur vindin, men tað verður framvegis ælingur, tó við sólglottum av og á, sigur Petur Skeel.

